# Í rættin við heilsutryggingini

Fleiri amerikanskir statir hava ilt við at góðkenna lógina um eina nýggja heilsutrygging, og í 12 statum hava myndugleikarnir gjørt av at royna málið í rættinum. Amerikanskir fjølmiðlar siga, at so skjótt Barack Obama, forseti, hevur staðfest lógina, fara myndugleikarnir í 12 statum at leggja hana fyri rættin við kravi um, at lógin verður dømd at vera í stríð við amerikonsku grundlógina og tí ólóglig. Teir 12 statirnir, sum fyrireika rættarmál ímóti nýggju heilsutryggingini, eru South Carolina, Florida, Alabama, Nebraska, Texas, Oklahoma, Pennsylvania, Washington, Utah, Virginia, North Dakota og South Dakota.




# Ísrael slakar ikki

Ísraelski forsætisráðharrin, Benjamin Netanyahu, gjørdi í gjárkvøldið greitt, at Jerusalem er ikki eitt hersett øki, men høvuðsstaður í Ísrael, og tí fer Ísrael at halda fram við at byggja bústaðir har, segði hann í einari røðu í Washington. Hann legði afturat, at tað jødiska fólkið bygdi Jerusalem fyri 3.000 árum síðani, og at tað jødiska fólkið byggir Jerusalem í dag. Benjamin Netanyahu segði, at hansara stjórn rekur sama politikk sum allar hinar ísraelsku stjórnirnar hava rikið síðani kríggið í 1967. Í Washington skal Netanyahu hitta Barack Obama, forseta, sum er ímóti ísraelsku byggiætlanini.



Mynd: Álvur Haraldsen



Mynd: Álvur Haraldsen




Við at skifta tvær 25 watt perur út við 7 watt spariperur, fimm 40 watt perur út við 11 watt spariperur og tríggjar 60 watt perur út við 15 watt spariperur, so sparir tú 396 krónur upp á eitt ár, um hesar lýsa í tveir tímar um samdøgurið.*

Tá langu og myrku dagarnir eru, lýsa fleiri perur sjálvsagt longri, og við at fara meira víðgongt til verka er uppaftur meira at heinta her eisini.

### Køliskápið

Eins og við frystiboksini eru pengar at heinta við at skifta køliskápið út.

Dømi: Eitt 116 litrar stórt Gram køliskáp, sum varð selt millum 1994 og 1997, brúkar fyri 448 krónur um árið í streymi.

Keypir tú hinvegin eitt nýtt køliskáp frá Gram, sum er 388 litrar til støddar, og hevur A+ sparimerkið, so nýtir tað fyri 221 krónur um árið í streymi.

Sostatt kann tú, við at keypa eitt nýtt køliskáp, køla tríggjar ferðir so nógva vøru fyri helvtina av kostnaðinum.

Uppaftur eldri køliskáp nýta sjálvsagt meira, og er tá uppaftur meira at spara, serliga um talan er um eitt stórt, eldri køliskáp.

### Standby nýtsla

Øll húsarhald í dag eru fylt við tólum, sum standa á Standby, meðan tey ikki verða nýtt. Men hesi tólini brúka streym, sjálvt um tey eru sløkt.

Mett verður, at okkurt um 10 prosent av orkunýtsluni í einum vanligum húsarhaldi, er til tól, sum standa á standby. Hetta svarar til umleið 600 kWh um árið, sum við dagsins prísum kosta líka omanfyri 900 krónur um árið.

Tekur tú eina PlayStation2, so nýtir brúkar hon 23,65 kWh um árið, um hon stendur á standby.

Ein fartelefonløðari, sum stendur í kontaktini meðan hann ikki verður brúktur, brúkar í miðal 20 kWh um árið.

Ein ISDN/ADSL beinari (routari) nýtir vanligt upp til 88 kWh um árið, um hann bara stendur tendraður, og ikki verður sløktur, tá hann ikki verður nýttur – eitt nú um náttina.

Soleiðis kundu vit hildið áfram, bæði við stereoanleggum, DVD-spælarum, sjónvarpsmóttakarum, løðarum til borimaskinur, tannbustir og so framvegis.

Tilsamans loypir henda óneyðuga nýtslan skjótt upp í nógvar krónur um árið.

Tó eru ráð fyri tí. Í dag fáast sokallaðir spariskinnarar til teldur og sjónvørp, sum sjálvir merkja, nær tú sløkkir sjónvarpið ella telduna, og sjálvir sløkkja restina tá.



Mynd: Álvur Haraldsen

Við at seta ein spariskinnara til sjónvarpið og alla ta tilhoyrandi útgerðina, so sum parabolmóttakara, dvd-spælara og surround-anlegg, sparir tú umleið 150 krónur árliga.

Við at seta ein slíkan til borðtelduna kann tú spara upp í 180 krónur árliga.

Ein slíkur skinnari kostar í Føroyum umleið 125 krónur, og sparir sostatt seg sjálvan inn aftur innan eitt ár.

### Sjónvarp

Nógv halda, at ein av teimum nýggju sjónvarps flatskíggjunum er nógv meira orkusparandi enn gomlu sjónvørpini. Men soleiðis er tað ikki neyðturviliga. Og í hesum førinum kann tú við vissu siga, at størri er ikki altíð betri.

Royndir við sjey ymiskum flatskermum frá 32 tummum upp til 40 tummar vísa, at orkunýtslan sveiggjar úr 85 wattum um tíman upp í 287 watt um tíman. Hetta seinasta er fyri ein 40 tumma plasmaskerm, sum eru veruligir streymslúkarar.

Sambært MedieStatistikBanken í Danmark ein miðal dani tveir tímar og trý korter frammanfyri sjónvarpsskíggjanum. Tí er ikki óvanligt, at ein slíkur sjónvarpsskíggi stendur tendraður í 6 tímar um samdøgurið.

Samanbera vit 32 tumma LCD sjónvarpið omanfyri, sum nýtti 85 watt, við 40 tumma plasmaskermin, sum nýtir 287 watt, og lata hesar koyra í seks tímar um samdøgurið í eitt ár, so er munurin úr 284 kWh upp í 838 kWh um árið. Hetta svarar til eina meirnýtslu av streymi fyri 893 krónur um árið fyri.

Og hetta er bert fyri ta eina sjónvarpið í húsarhaldinum.

### Farteldu fyri borðteldu

Tað er heldur ikki óvanligt at fleiri teldur eru í einum miðal føroyskum húski. Ofta er í minsta lagi ein av hesum ein borðtelda.

Hevur tú eina borðteldu við einum av gomlu, stóru skíggjunum, vísa kanningar, at tú kanst spara heilt upp í 600 krónur um árið við at skifta hana út við eina nýggja og orkusparandi farteldu.

### Fleiri túsund krónur

Tekur tú øll omanfyristandandi dømini og leggur tey saman, kemur tú upp um 4.600 krónur, sum tú kann spara um árið.

Ger tú hinvegin eitt sindur meira burturúr, kann tú koma upp um 5.000 krónur um árið, sum tú sparir í streymi.

Hesin peningur kundi passandi verið nýttur til at gera nýggjar íløgur í fleiri orkusparandi tiltøk í húsarhaldinum.

Ella sum eitt eyka ískoyti til eina uttanlandsferð við familjuni.

*Hædd er tikin fyri at ein gløðipera livir í 1.000 tímar og kostar 12 krónur at keypa, og at ein A-sparipera, sum livir í 10.000 tímar, kostar 55 krónur at keypa. Hetta er tó eftir donskum prísum.

**KELDUR:**
Elsparefonden
SEV
DongEnergy
MedieStatistikBanken




# NYD PÅSKEN I KØBENHAVN

**Familieværelse incl. påskeæg til børnene, fri parkering tæt ved hotellet og stor morgenbuffet. Kr. 845,-**

*Prisen er pr. nat Pris for standard dobbelt Kr. 750,- Tilbuddet gælder påsken 26/3 – 5/4 (begge dage incl.)*



Best Western
BEST WESTERN HOTEL HEBRON Helgolandsgade 4, 1653 København V, **Tel.: +45 33 31 69 06 - www.hebron.dk - info@hebron.dk**